# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sirið Stenberg, løgtingsmaður

**Svarari:** Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

**Evni:** Hjálparátøk fyri húsarhald vegna høgu inflasjónina

**Spurningar:**

1. Hvussu metir landsstýrismaðurin, at hækkandi prís- og kostnaðarstøðið ávirkar húsarhaldini í Føroyum?
2. Hvørjum hjálparátøkum arbeiðir landsstýrismaðurin við fyri at bøta um støðuna hjá teimum, sum verða hart rakt av inflasjónini, t.d. teimum nógv hækkandi prísunum á m.a. brennievni og matvørum?
3. Eru serlig hjálparátøk ætlað teimum, sum bert hava fólkapensjón, fyritíðarpensjón ella almannaveiting at liva av?
4. Eru serlig hjálparátøk ætlað teimum við lægstu inntøkunum?
5. Eru serlig hjálparátøk ætlað sperdum barnafamiljum?

**Viðmerkingar:**
Høgi prísvøksturin seinastu tíðina hevur sera stóra ávirkan á lívikorini hjá fólki. Tað eru tey við teimum lægstu inntøkunum, sum verða lutfalsliga harðast rakt. Gerandisvørurnar eru dýrkaðar nógv, og methøga príshækkanin fyri brennievni rakar ómetaliga hart.

Hetta er ein støða, sum kemur uttanífrá, og fólk hava ikki havt møguleika at vart seg fyri hesum. Tey hava onga ávirkan á støðuna og ei heldur møguleika til sjálvi at koma sær úr støðuni.

Tað hava verið nógvar røddir frammi um at seta tíðaravmarkað hjálpartiltøk í verk fyri at tryggja livikorini hjá fólki og at fyribyrgja fátækt.

Spurningurin er tí, hvørjum landsstýrið arbeiðir við fyri at minka um avleiðingarnar av inflasjónini, til tess at sosiali ójavnin í landinum ikki økist.

**Á Løgtingi, 19. mai 2022**

Sirið Stenberg